# Skulu bora 11 brunnar næstu árini

**Eftir væleydnaða Cambobrunnin hjá Hess standa nú ikki færri enn 11 brunnar á borikalendunum hjá oljufeløgunum á Atlantsmótinum komandi árini.**

OLJULEITING Á ATLANTSMÓTI

*Jan Müller*

Nýggi brunnurin, sum Amerada Hess, Texaco, Dong og OMV hava borað á bretska landgrunninum nakað norðan fyri verandi oljufelt og tætt upp at føroyska markinum, kann gott koma og gerast ein nýggj vend fyri Atlantsmótið. Við pílinum uppeftir. Sosialurin veit at siga frá keldum í oljuvinnuni, at Cambobrunnurin kann gerast so mikið áhugaverdur, at tað verður farið at bora ein avmarkingar- og metingarbrunn longu næsta summar ella í 2004. –Hetta sær gott út og er orsøk til bjartskygni segði ein kelda við blaðið nú um dagarnar. Nú skilst at fundið, sum er gjørt, kann gerast eins áhugavert og Marjunbrunnurin inni á føroyskum øki, í onkrum føri kanska enn meira áhugavert vita keldur í oljuvinnuni at siga frá. Talan er um olju. Hetta var annars ein “high-risk” brunnur tvs. at møguleikin fyri at bora turt var rættiliga stórur, nú borað verður væl norðan fyri verandi oljuframleiðandi felt. Tað var ikki mett neyðugt at testa brunnin men at gera sær metingar av, um farið kann verða víðari til at bora avmarkingarbrunn. Verður talan um at fara undir eina “appraisal” boring, sum okkurt í løtuni kundi bent á, so kann tað enda við eini veruligari útbygging. Tað vil tíðin so vísa. Og er talan um eitt veruligt fund, so kann tað fáa stóran týdning fyri komandi leitingina á føroyskum øki. Tí tað kann blíva eitt týðandi referansupunkt til ta vitan man longu hevur um aðrar partar av økinum.

Tað ger heldur ikki støðuna minni áhugaverda, at ætlanin er at fara undir at bora ein avmarkingarbrunn við tilknýti til Suilvenfundið longur syðri longu í juli næsta ár. Og at tað síðani liggur í kortunum, gevur hann eitt gott úrslit, at fara undir at útbyggja feltið við fyrstu oljuni frá 2005.

Longur vesturi verður so eisini arbeitt við at byggja stóra Clairfeltið út. Fyrsta framleiðslan er væntandi í 2004. Hesin oljurisin var funnin í 1978, men hevur ligið í dvala til nú.

Alt hetta ber boð um, at hóast tað gongur spakuliga fram við at menna oljuframleiðsluna á Atlantsmótinum, so gongur tað stútt tann rætta vegin. Sum vit síggja á kortinum, ið Sosialurin hevur latið gera í samarbeiði við Statoil Exploration, so gongur tað meira og meira tann vegin, at oljufeløgini fara at eygleiða alt mótið tvs. bæði bretska og tað føroyska økið sum eina heild, sum ein nýggjan og týðandi oljulandslut.










## Programme

| | |
|---|---|
| 8:30-9:00 | **Registration and coffee** |
| 9:00-9:15 | Opening Address<br>*Eyðun Elttør, Minister of Petroleum* |
| | **Status** |
| 9:15-10:45 | **Ministry of Petroleum**<br>*Martin V. Heinesen, Head of Geological Survey*<br>**Faroes Agip Faroes 2003 drilling campaign: status of the work and 2002 achievements**<br>*Luca Dragonetti, Faroes Project Manager, Agip*<br>*Iain Mitchell, Senior Vice President Marketing, Dolphin Drilling Ltd*<br>**Activity status for the Atlantic Margin**<br>*Kent Høgseth, Exploration Manager Deep Water, Statoil*<br>**Status report**<br>*Philip Loader, Exploration Manager, Atlantic Margin and North Africa, Anadarko*<br>***Statement of Affairs***<br>*Richard Hollingsworth,UK/Faroes Exploration Manager, BP*<br>**Activity status for the Faroes**<br>*Ben Arabo, Country Manager Faroes, Amerada Hess* |
| 10:45:11:15 | **Coffee** |
| | **Future prospects and licence rounds** |
| 11:15-11:40 | **The basalt challenge**<br>*Martin V. Heinesen, Head of Geological Survey, Faroes* |
| 11:40-12:00 | **Status from "Sindri"**<br>*Lars Bæksgaard, DONG, Chairman of Sindri Steering Committee* |
| 12:00-12:10 | **Licence round 2**<br>*Mr Herálvur Joensen, Director General, Ministry of Petroleum,* |
| 12:10-13:15 | **Lunch** |
| | **Norwegian experiences** |
| 13:15-13:45 | **Snøhvit. A new adventure**<br>*Kai Lima, Manager, Business Development, Statoil* |
| 13:45-14:15 | **Regionalisation of the oil and gas industry - a project proposal**<br>*Erling Bortne, Senior Adviser, VINN* |
| 14:15-14:30 | **Coffee** |
| | **Commercial opportunities outside the Faroes** |
| 14:30-15:00 | **The Expansion of Atlantic Petroleum's Activity Outside the Faroes**<br>*Wilhelm Petersen, Managing Director, Atlantic Petroleum*<br>**General comments about Faroese companies experiences outside the Faroes**<br>*Magni Arge, Chariman of FOIA* |
| 15:00-15:15 | **Coffee** |
| | **Faroese Participation** |
| 15:15-16:15 | **The Faroes Parnership approach to Faroese Participation**<br>*Ben Arabo, Country Manager Faroes, Amerada Hess*<br>**Geomechanical fracture models. A contribution to well planning**<br>*Jóannes Djurhuus, Post-doc scientist at the Faculty of Science and Technology, University of the Faroe Islands*<br>**A brief outline of BP's Faroese Participation**<br>*Tummas Pauli Myri, Business Development Advisor, BP*<br>*Elsa Maria Holm Olsen, Vice Principal, Faroese Business School* |
| 16:15-16:30 | **Coffee** |
| 16:30-17:00 | **An update of the Business Development Advisory Service**<br>*Ólavur Gregersen, Business Development Adviser, Agip*<br>**Winner of Xplore, the Petroleum Exploration Business Game**<br>*- The Game, Ólavur Ellefsen, Managing Director, Tøkni*<br>*- Experiences from the Competition, Claus Reistrup, Ministry of Education*<br>*- The Prize will be handed to the Winning Team by Mr. Eyðun Elttør, Minister of Petroleum* |
| 17:00-17:15 | **Magni Arge, Chairman of FOIA, concludes the day** |
| 17:15- | **Refreshment** |

*Havnar Klubbi, the old club in the centre of Tórshavn (Tinghúsvegur 8) will be open for participants in Offshore Faroes 2002 Wednesday evening from 21:00.*

petur & petur • 320870

VINNUHÚSIÐ
*House of Industry*

**Oljuvinnufelagið**

C/o Vinnuhúsið, Boks 1038, R.C. Effersøesgøta 30, FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 18 64, Fax 31 72 78, teldupostur: industry@industry.fo

Agip Faroe Branch — The Faroes Partnership — STATOIL — bp